# Vónandi taka tit trupulleikan í álvara



*Tá ið politikararnir vóru á ellisheiminum á Tvøroyri mikukvøldið, nýtti Elin Vang høvi til at heita staðiliga á politikararnar um at fáa ein stovn fyri heilaskadd. Maðurin í koyristóli er Elmar Johannesen, sum er ein av teimum mongu, sumer dottin niðurímillum tí at onki slíkt heim er. Herfyri fortaldu vit eisini søguna um Elmar her í blaðnum*

**Heilaskadd í Føroyum eiga ongan góðan søgdu Elin Vang og Jens Johannesen á Tvøroyri við løgtingsmenn, tá ið teir komu á Suðuroyar Ellis- og røktarheim mikukvøldið**

SUÐUROYARVITJAN
*Áki Bertholdsen*

– Heilaskadd í Føroyum eiga ongan als ongan.

Tað bleiv tikið kontant ímóti løgtingslimunum, tá ið teir komu til Suðuroyar mikukvøldið.

Alt Løgtingið var mikukvøldið og í gjár eina kunnandi rundferð í Suðuroynni, men teir høvdu ikki meiri enn stigið í land av Smyrli á Drelnesi, tá ið teir fingu tað fyrstu kunningina.

Og hon var frá Elini Vang og Jens Johannesen, sum bæði eru avvarðandi hjá fólki, sum eru illa heilaskadd og sum greiddu løgtinginum frá støðuni hjá teimum føroyingum, sum hava heilaskaðar.

Vegna tey bæði segði Elin Vang, at tað er ongin neurologiskur lækni, sum fæst við heilaskaðar og tað er ongin sálarfrøðingur, sum fæst heilaskaðar.

Tað er heldur ongin sum helst stovnur í landinum, sum er serliga til fólk við heilabreki.

Samstundis vísti hon á, at tað eru rættiliga nógv fólk við heilabreki. Í 1999 vóru 87 fólk skrásett á Landssjúkrahúsinum við heilabreki, í 2000, vóru tey 72 fólk og í fjør vóru tey 70.

– Hon legði dent á, at tá eru tey, sum fáa heilaskaðar í ferðsluvanlukkum, ikki tald við.

Tískil vóru hesi fólkini púrasta dottin niðurímillum. Sjálv umboðaði hon Páll Vang, gamla landsstýrismannin og borgarstjóran á Tvøroyri og hann hevur búð í Danmark í tvey ár, tí í Føroyum er onki mennandi tilboð til hansara. Jens Johannesen umboðaði Elmar Johannesen, sum hevur líknandi skaðar, men sum heldur ongi tilboð hevur herheima.

Tí heitti tey bæði staðiliga á politikararnar um at skipa stovnar beinanvegin, so at hesir sjúklingarnir høvdu onkustaðni at vera og tey handaðu eisini løgtingsformanninum eina skrivliga áheitan um hetta sama.

Edmund Joensen, løgtingsmaður, takkaði fyri upplýsingarnar og segði, at hann var vísur í, at Landsstýrið fór at taka hetta við í síni viðgerð og at løgtingsmenn eisini høvdu lagt sær hetta í geyma.

Á Ellis- og røktarheiminum, nýttu løgtingslimir eisini høvi til at heilsa upp á starvsfólk og búfólk, teir vóru runt á heiminum og á sjúkrahúsinum og afturvið einum kaffimunni í matstovuni á skúkrahúsinum, fingu teir eisini eina frágreiðing um heilsuverkið í Suðuroynni.

Í gjár var Løgtingið á



*Løgtingsmenn lurta við áhuga eftir, tá ið Elin Vang og Jens Johannesen greiddu teimum frá, hvussu átorkandi tað er at fáa ein stovn fyri heilaskadd*



*Tá ið tingmenn vóru á ellis- og røktarheimnum á Tvøroyri mikukvøldið, nýttu teir eisini høvi at heilsa uppá nøkur av búfólkunum. Her er tað Óli Breckmann, sum tosar við Emmu Bech úr Porkeri. Sanna Herdalur úr Hovi situr undir liðini á henni og tosar við Edmund Joensen, Jenis av Rana, fyristøðukvinnuna á Ellisheiminum og Henrik Old*



Ingvør Nolsøe:

# – Olofson hevur misskilt Bíbliuna

**Peter O. K. Olofson átti at lisið Bíbliuna umaftur, tí hann hevur misskilt hana so dyggiliga, sigur Ingvør Nolsøe, sum er ein av teimum, sum hevur skrivað undir yvirlýsingina fyri rættindunum hjá samkyndum í Føroyum**

SAMKYND
*Solby A. Eliasen*

Tá Sosialurin fær fatur á Ingvør, hevur hon ikki lisið viðmerkingina hjá Olofson, sum stóð í týsdagsblaðnum.

- Tað er undir mína verdigheit at lesa nakað, sum Olofson hevur skrivað, sigur hon.

Eftir at hava fingið viðmerkingina hjá Olofson lisna upp í gjøgnum telefonina, sigur hon seg vera púra skelkaða av, at Peter O. K. Olofson úttalar seg soleiðis.



Ingvør Nolsøe sigur, at Bíblian er ein kærleiksbók, og tá Peter O.K. Olofson oysir sítt gor og gall útyvir onnur við henni í hondini, er tað omanfyri alt lágmark.

- Hann brúkar Bíbliuna, sum er ein kærleiksbók at klikkja onnur menniskju niður við.

Jesus prædikaði um kærleika, og tí haldi eg, at Olofson má hava misskilt Bíbliuna, tá hann las hana. Hann átti at roynt at lisið hana einaferð afturat.

- Eg eri skelkað av, at Føroyar uppføra seg sum eitt miðaldarsamfelag. Hvørji eru vit at døma um, hvat er rætt ella skeivt?

*Ingvør Nolsøe sigur, at Bíblian er ein kærleiksbók, og tá Peter O.K. Olofson oysir sítt gor og gall útyvir onnur við henni í hondini, er tað omanfyri alt lágmark*

Nei, nei, lat hasi neyðar menniskjuni fáa frið, sigi eg bara, sigur Ingvør Nolsøe.

Hon heldur, at tað er spýggiligt at hoyra løgtingsmenn standa og prædika um rætt og skeivt í hesum førinum. Tað er sanniliga heldur ikki teirra uppgáva at døma um, hvat er rætt, og hvat er skeivt. Eisini heldur hon, at hetta má verða tað reina stemmuslúkarí.

Hon heldur, at tað er ófatiligt, at vit í 2002 sita og kjakast um fosturtøku og samkynd.

- Hetta eru miðaldartrupulleikar, sum tað verður kjakast um, heldur hon.

- Tað átti ikki at verið neyðugt at kjakast um tað, tí tað er onki at kjakast um. Skulu vit hava skrásett parlag? JA! og fría fosturtøku JA! Gev hesum fólkunum frið! Tað verður tosað um, tað er normalt ella ikki. Eg spyrji bara, hvar er linjan, sum skilir ímillum tað normala og hitt? Og hvør skal gera av, hvar hon er?

Ingvør sigur, at hon hevur gjørt nógv fyri, at fáa fólk at skriva undir yvirlýsingina, tí hon heldur so avgjørt, at hesi fólkini skulu fáa frið og ikki verða klikkaði niður av einum minniluta, sum tíanverri er sloppin til orðanna.

- Tí tað er jú tað, sum Bill Justinussen og Peter O. K. Olofson umboða: Ein minniluta í Føroyum, sigur Ingvør, sum er sannførd um, at meginparturin av føroyingum ikki taka undir við teirra víðgongdu sjónarmiðum at enda.

Peter O. K. Olofson:

# Gud er kærleikin

**Í viðmerking til tað, sum Ingvør Nolsøe førir fram, sigur Peter O. K. Olofson, at Gud hevur skapað mann og kvinnu at liva saman í hjúnabandi**

SAMKYND
*Solby A. Eliasen*

Peter O. K Olofson sigur, at um fólk taka undir við samkyndum, so er tað heiðinskapur, tí tað er ein heiðin liviháttur.

- Tað er satt, at Bíblian er ein kærleiksbók. Og at Gud er kærleiki. Tá Hann opinberar, hvat kærleiki er, opinberar Hann, hvør hann er, og hvat kærleiki er. Tað vil siga, at tá vit spyrja, hvat kærleiki er, so hyggja vit ikki inn í okkum sjálvi, men venda okkum til kærleikan sjálvan, sigur Olofson.

Hann heldur fram, at tá Gud sigur, at at stjala, lúgva, ótrúskapur í hjúnalagi og so framvegis ikki er kærleiki, so nyttar tað onki, at menniskju siga, at tað er tað. Og tað er tað sama galdandi, tá tað kemur til samkynd.

- Um vit spyrja Gud, hvussu vit liva í kærleika. Hann hevur skapað mann og kvinnu at liva saman í hjúnarlagi. Tað lesa við í Kærleiksbókini, sigur Olofson.



*- Líkasum Gud hatar syndina, men elskar syndaran, so mugu vit kristin gera tað sama*

Hann sigur eisini, at menniskju døma allatíðina, hvat er rætt ella skeivt. Og um vit onki stavnhald hava, so endar alt við anarki.

- Kristin vita, at vit eru syndarar. Vit koma so lættliga út á eitt síðuspor, og tá er tað so lætt at siga, at tað vit gera, er rætt til egnan fyrimun. Tá er tað, at vit sum kristin leita til Gud og spyrja hann.

Olofson sigur, at øll fólk leita til eitt stað, og øll hava eitt hugburðstað til, hvat er rætt ella skeivt. Og tað staðið, er Bíblian hjá teimum kristnu.

- Líkasum Gud hatar syndina, men elskar syndaran, so mugu vit kristin gera tað sama, og siga vit so ja til eitt nú samkynd, so svíkja vit tann, sum vit elska. Vit lata viðkomandi sigla sín egna sjógv, sigur hann.

At enda sigur Peter O. K. Olofson, at onki stjórnuvald hevur myndugleika til at forkasta Guds vilja.

FM í virkisfótbólti 2002

Høvuðsstuðul
TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA

Skipað verður fyri FM-kapping í virkisfótbólti í Gundadali leygardagin 12. oktober frá uml. kl. 9 til uml. kl. 18.

**Nakrar reglur fyri kappingina**

- Spælt verður á hálvum vølli
- 7 leikarar eru á hvørjum liði + 5 skiftisleikarar
- Luttakandi leikarar mugu ikki hava spælt í 1., 2., 3. deild ella í steypakappingini hjá FSF í ár
- Seinasta freist at boða frá luttøku er hósdagin 3. okt.
- Luttøkugjaldið er 600,- kr. fyri hvørt lið
- Møguligur ágóði av kappingini fer til uttanlandsferð hjá B36-piltum 2003
- Fullfíggjaðar kappingarreglur eru at finna á www.b36.fo

Luttakandi lið skulu tekna seg til kappingina við at faxa lepan niðanfyri.

B36

Navn á liði/liðum
Arbeiðspláss
Kontaktfólk
Tel/e-mail

FM í virkisfótbólti 2003 • Faxa seðilin til B36 • Fax nr. 31 80 36